# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**BMW 320i**
6 cyl sýnaður í aug. Bíliga til sølu
*Tlf. 448702-509462*

**TOYOTA CAMRY**
Árg. 1987, aut. gear, 2.0, bíliga til sølu.
*Tlf. 584401*

**FORD FIESTA 1.1**
árg. 88, nýsýnaður, til sølu fyri 5.000,-
*tlf. 223459*

**NISSAN 1.4 TIL SØLU**
árg. 1990, koyrt 157.000 km. Væl viðfarin, til sølu fyri kr. 7.500,-
*Tlf. 316153*

**SVARTUR BMW 316**
árg.88 til sølu fyri 12.000,- kr.
*Tlf. 212322*

**OPEL CORSA**
diesel, árg. 94, til sølu fyri 3.000,- kr. Brotnan forrút.
*Tlf. 503052*

**CITROEN XSARA 2.0 HDI**
til sølu um hóskandi boð fæst. Seldur vegna flyting.
*Tlf. 586058, Hans*

**TIL SØLU**
Mazda 929 2,2, árg. 89, nýsýðaður, til sølu. Vetrardekk fylgja við. Ring og hoyr nærri á
*Tlf. 251304*

**NISSAN BLUEBIRD 1.8**
árg. 07/85, sýnaður 7. apríl, til sølu fyri kr. 2.500,-
*Tlf. 221113*

**TOYOTA COROLLA TIL SØLU**
1.3, árg. 95, vegna keyp av bili við størri motori.
*Tlf. 421569/227706*

**VW GOLF**
árg. 1989, til sølu fyri 6.000,-
*Tlf. 582924*

**TOYOTA CAMRY 1.8 ST. CAR**
árg. 88 til sølu sum eykalutir, hevur skift nógv út, t.d. báðir forskermarnar, kompl. útstoyt.
*Tlf. 749991*

**TIL SØLU**
Mazda B2500, 4x4, árg. 96, koyrt 106.000 km, til sølu fyri 60.000 kr.
*Tlf. 218067*

**SAAB 9000S**
árg. 87, km 139.750. Sýnaður í mai 05. El-rútar, el-spegl, el-sóltak og hita í setrinum, útstoyt skift og toppakningur. Til sølu fyri 12.000 kr. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 226880*

**SAAB 900**
til sølu. Prísuppskot: 4.000,-
*Tlf. 213736/315942*

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 ferðir
***(set X)*** undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út-& sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ ..... |

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.***

Sent hevur:

Navn:……..

Bústaður:……

Bygd/býur:……

Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

## Alt til akfør

**FELGUR YNSKJAST**
Bíligar felgur, evt. stálfelgur ynskjast til keyps, 4 hol, 4x100, helst 14"
*Tlf. 222987*

**GÓÐ VETRARDEKK**
Dayton DW500 Winther Lamell 175/70R14, bert brúkt 1 mánað. 4 stk. fyri 1/2 prís 1500 kr.
*Tlf. 310151 ella 510889*

**4 PÍKADEKK Á FELGUM**
Avon 155/80R13. Brúkt til Mazda 121, til sølu fyri 1500 kr.
*Tlf. 313299*

**4 GÓÐ KAVADEKK TIL SØLU**
á felgum + skálir til Skoda Fabia, 5 hol, 5x100 millum holini, 175/65 14" til sølu fyri 1.500,- kr.
*Tlf. 252829*

**SPORTFELGUR**
Til sølu eru 4 nýggjar 17" sportfelgur, koyrt max 500 km. Merki Rial Monza, passa til Skoda Fabia, 5 hol, 5 x 100, 205/40 17" nýprísur 13.000 kr. Til sølu fyri 6.500 kr.
*Tlf. 252829*

**TIL SØLU**
4 spildurnýggj summardekk Toyo Tranpath J38 stødd 185/65 R14 til sølu fyri 1500 kr.
*Tlf. 252829*

**BILSTEREO**
við MP3 til sølu fyri 2.000 kr.
*Tlf. 256070*

**SPORTFELGUR**
4 sportfelgur av slagnum Analini til sølu. 16" 4 hol. 2 Dunlop 205/45. Summardekk fylgja við. Prísur 4.500,-
*Tlf. 316153*

**FELGUR TIL SØLU**
4 felgur til Mazda 323 til sølu.
*Tlf. 220589*

**ALUFELGUR**
4 stk við dekkum 195/65 x 15. Passa m.a. til opel 4 hol. Bíliga til sølu
*Tlf. 513966 Tórshavn*

**FELGUR TIL SØLU**
4 til Saab 900. 800 kr.
*Tlf. 584737*

**PÍKADEKK TIL SØLU**
4 góð píkadekk Firestone 185/65 R15 til sølu.
*Tlf. 314383/311943/322117*

**VETRARDEKK Á FELGUM**
4 vetrardekk á felgum, stødd Good Year Ice navi 185/65 R15. Passa til Mitsubishi Carisma, til sølu fyri 2.000,- kr.
*Tlf. 218741*

**EIN NISSAN SONNY**
bensin motorur 1.7, árg. 90, í góðum standi, til sølu. Stendur í skrokki.
*Tlf. 744167/444167*

## Arbeiði

**REINGERÐING**
Eg átaki mær alt reingerðingsarbeiði. Ring
*Tlf. 258186*

**VENJARI TIL ROYN**
Við hesum verður søkt eftir venjara/spælandi venjara til bóltfelagið Royn til kappingarárið 2006. Meiri fæst at vita frá formanninum á tlf. 375298 ella 228398.
*Royn*

**HÚSHJÁLP YNSKIST**
Kvinna, 50-70 ár, søkist til húshjálp 2 ferðir um vikuna. Góð løn. Hevur hetta tín áhuga, skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 2196/2*

**ARBEIÐI EFTIR SKÚLATÍÐ**
19 ára gamal drongur søkir arbeiði nakrar tímar um vikuna aftaná skúlatíð og í vikuskiftunum. Havi koyrikort.
*Tlf. 510153*

**TANN FØROYSKI HÁRFRÍÐKANARSKÚLIN**
Dámar tær at fríðka hár og smyrsl so støkk inn á gólvið og hoyr meiri um skúlan.
*Tlf. 314768/311683 e.kl. 19, Torfinsgøta 6, Havn*

## Barnaansing

**MODEN BØRNEVANT DAME**
søges til pasning af Johannes på 1 1/2 år. God betaling gives til den rette person. Der lægges stor vægt på følgende: - at du er tillidsvækkende og glad for børn.- at der er andre børn Johannes kan lege med. - at du er ikke-ryger. Kontakt Maiken Bech på tlf. 322112. mobilnummer: 582615.
*Tlf. 322112/582615*

## Barnaútgerð

**BARNAVOGNUR**
Svartur Silvercross barnavognur viðtilhoyri til sølu. Grulvigarður + 2 verndarportur.
*Tlf. 268453*

**SVARTUR ODDERVOGNUR**
v/ babylift u/ madrassu, regnslag, flgunet, dýna, koddi, puslitaska. Handtakið kann stillast. Til sølu fyri 2.500,-
*Tlf. 444008/744008*

**VOGNUR/BILSTÓLUR/SONG**
Skemmuvognur v/lift 300,- Bilstólur (baby) 400,- Tremmusong v/ madrassu 400,- Bilstólur (0-18 kg.) 300,-
*tlf. 321694*

**TRIP TRAP YNSKIST**
Ein Trip-Trap barnastólur (ella líknandi) ynskist til keyps.
*Tlf. 321694/521694*

**BRIO KLAPVOGN**
sælges. Blå, rød og hvid med klassisk mønster. Kr. 500,-.
*tlf. 503419*

**KOMBIVOGNUR TIL SØLU**
Ein Simo kombivognur í góðum standi er til sølu. Prísuppskot 1000 kr.
*Tlf. 251589*

**BILSTÓLUR 0-13 kg.**
Stólurin er av merkinum Birtax í eru góðkendir stólar. Er í góðum standi og hevur góða nakkastøttu. 250 kr.
*Ring 254741 ella 221917*

**KOMBI**
tvíburavognur av merkinum Simo til sølu fyri 2.500,- 2 litir, selar, regnslag og flugunet fylgja við.
*Tlf. 260917*

## Bátaútgerð

**TIL SØLU**
Ein rustfríur gogguknúsari við skiljara/ristara.
*Tlf. 221268*

**BÁTAR TIL SØLU**
Um nóg høgt boð fæst, er eitt 8-mannafar og ein 23 fót glastrevjabátur til sølu.
*Tlf. 540948*

**KABÚSS YNSKIST**
Ein brúkt kabúss, til bát ynskist til keyps.
*Tlf. 277155*

## Bingo

**BINGO**
Bingo verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 29. okt. kl. 16.00. 2 ísl. krov á lutaseðli.
*Eldrafelagið Borgin*

**GOTT BINGO**
Verður í Pállsstovu mánakvøldið 31. okt. kl 19.00. 15 vinningar á lutaseðlum. Høvuðsvinningur: Flogferð. Eisini verður bingola og 20 kr.-spælið.
*Astma og allergifelagið*

**BINGO**
verður í Pálsstovu sunnudagin 30. okt. kl. 16.00. Full pláta 10 x 400 kr. og 2 x 600 kr. Á lutaseðli 3 før. røst krov. Eykaspæl, koyring heim.
*Kiwanisfelagið Rósan*

**ÁRASØLA**
Hósdagin 27. okt. kl. 19.00 hevur Heimaforbundið stóra árasølu. Nógvir góðir vinningar.
*Frelsunarherurin í Tórshavn*

**GOTT BINGO**
Gott bingo verður í Glæmuni í Kvívík sunnudagin 30. oktober kl. 16.00. 12 plátir á 100 kr. Drigið verður í millum spølini.
*Bygdafelagið Glæman*

## Bøkur

**DEAN KOONTZ**
28 bøkur til sølu, 1.000,- ella hægst bjóðandi.
*Tlf. 222790*

## Burturm. /funnið

**BURTURMIST**
Brillur við bláum stelli, í einum hvítum etui, burturmistar á leiðini Jónas Broncks gøta, Bøkjarabrekka, Niels Finsens gøta, Varðagøta.
*Ring á tlf. 251343*

**ER TAÐ NAKAR**
ið hevur funnið mínar brillur, tær blivu vekk í síðstu viku, tær vóru í hylki, vinarliga boða mær frá.
*Tlf. 545160*

**ER TAÐ NAKAR**
sum hevur funnið eitt svart og grønt mynstrut ullint turriklæði, mist í miðbýnum 7. oktober ein fyrrapart. Hetta turriklæði hevur serligan týdning fyri meg.
*Tlf. 212888/311642*

## Býli í Føroyum

**HÚS TIL SØLU Í HVALVÍK**
Um hóskandi boð fæst, selji eg míni fittu hús í Hvalvík. Húsini eru í 3 hæddum, í kjallaranum er wc við brúsu, í miðhæddini er køkur,s tova og durur, á loftinum eru 2 sovikømur. Garður er rundan um húsini + úthús. Húsini eru í fínasta standi og sera hugnalig.
*Tlf. 422848/263260*

**KAMAR TIL LEIGU**
Kamar til leigu í Havn. At gongd til wc/bað og køk/vaskimaskinu.
*Tlf. 282600*

**ÍBÚÐ TIL LEIGU**
Uml. 36 fermetrar íbúð til leigu til ikki roykjarar. Mánaðarlig leiga 3.000 kr. við el og hita.
*Tlf. 211224*

**HÚS TIL LEIGU**
Hús í Sløldarfirði til leigu frá 1. nov. 2005.
*Tlf. 257941*

**ÍBÚÐ Í HAVN TIL LEIGU**
90 m2, køk, stova, badiverilsi og 2 kømur, leiga 5.000 kr uttan el og hita, 2 mdr dep.
*skriva: futalag2000@yahoo.dk*

**NÝUMVÆLD LOFTSÍBÚÐ Í SYÐRAGØTU**
Til leigu frá 1. nov. til fólk, sum ganga væl um, helt ikki-roykjarar. Nærri fæst at vita við at venda sær til
*Tlf. 316687 ella 216686*

**LÍTIÐ KAMAR TIL LEIGU**
Við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu, nær við Læraraskúlan.
*Tlf. 313799 ella 514765*

**HÚS Í TJØRNUVÍK**
Hús ynskjast til keyps í Tjørnuvík ella evt. grundstykki.
*Tlf. 318133/511142*

**HÚS TIL SØLU**
Gomul sethús matr. nr. 461 miðskeiðis á Tvøroyri til sølu. Áhugað kunnu ringja
*tlf. 315072/264334*

## Býli uttanlands

**FRAMLEIGA Á AMAGER**
1. verilsis íbúð á Kvintuskollegienum til leigu frá 1 november 2005 og hálvt ár fram. Gott bus- & metrosamband. Liggur tætt við Amagersentrið. 2500kr. um mánaðin.
*Ring til 30297908*

**ÍBÚÐ/KOLLEGIE**
søkist í Kbh í tíðarskeiðinum 20/11 til 2/12 ella evt. stytri tíðarskeið.
*Ring 262989*

**ÍBÚÐ Í HBH YNSKIST TIL LEIGU**
Ella framleigu, helst í minsta lagið 1 ár. Eri vegna serligar umstøður ikki alla tíðina í DK. Eg eri tilkomin kvinna, fari væl um og gjaldi til tíðina. Ring
*Tlf.573999*

**ÍBÚÐ Í KBH.**
Ein íbúð í keypmannahavn (Øresundskollegiet) til leigu í tíðarskeiðinum 15. nov 2005 til 15. jan. 2006. Ring og ger eina avtalu.
*Tlf. 586058, Hans*

**ÍBÚÐ YNSKIST SKJÓTAST**
Gjørligt í KBH-økinum til lærara-/sjúkrahúslesandi. Ring
*Tlf. 449942 ella 447942*

## Dansur

**DANSISTOVUGAMAN**
Dansistovugaman dansar sunnukvøldið í skúlagarðinum í Trongisvágs skúla frá kl. 20.00 til 22.00.
*Nevndin*

## Dýr

**FREMMANT LAMB**
upptikið í Gjógavrá haga í Fuglafirði. Møguligur eigarikann venda sær til
*tlf. 444860*

**GÁSAPAR**
Til sølu
*Tlf. 228514*

**HUNDAHVØLPAR**
Verða latnir til djóravin.
*Tlf. 503155*

**DALMATINARI**
til sølu fyri kr. 3.000,-
*Tlf. 442124*

**EG HAVI EITT**
Hamstrara búður sum eg fegin vil selja. Matur, bomm, spønir, matskálir, fløskur, hús kálksteinur og leikur o.a.fylgja við. Til sølu fyri 265 kr. Er hettar nakað fyri teg, so ring á
*tlf. 313966/275504*

**SAMOJED/BORDER COLLIE**
hvølpar til sølu. Kunnu avheintast beinanvegin.
*Tlf. 584172*